# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Spennandi og mennandi nýskapan

Landsstýriskvinnan, formaðurin í nevndini, sum hevur fyrireikað nýggju kunngerðina um útbúgvingarnar til lærara og pedagog, og rektarin á Læraraskúlanum søgdu seg á tíðindafundinum fyrrapartin í gjár at fegnast um, at málið nú er rokkið soleiðis, at tað nú er ein nýggjur og eftir øllum at døma modernaður formligur karmur um lærara og pedagog útbúgvingarnar.

Landsstýriskvinnan segði, at læraraútbúgvingin og pedagogútbúgvingin eru tær týdningarmiklastu í landinum. Tað er lætt at geva henni rætt í tí. Allir íbúgvar í samfelagnum eru fevndir av ásetingunum, sum eru um læraraútbúgvingina og pedagogútbúgvingina. Flestu børn eru undir pedagogiskum tilboðum í barnagarði og skúla, og nú eru pedagogar alt meiri við í arbeiðinum á stovnum og heimum, sum taka sær av teimum við avmarkaðum førningi og teimum elstu í samfelagnum.

Higartil hevur læraraútbúgvingin verið skipað í serligari lóg, sum kunngerðirnar fyri báðar útbúgvingarnar hava verið grundaðar á. Nú er tað lógin fyri Fróðskaparsetur Føroya, sum er lóggávan undir kunngerðunum fyri nevndu útbúgvingum. Landsstýriskvinnan hevur eftir øllum at døma fingið politiska undirtøku fyri hesi broytingini, og Lærarafelagið hevur ikki ultimativt mótmælt hesum.

At útbúgvingin er lækkað í formligari tign – frá lóg og til kunngerð – nýtist ikki at merkja tað sama, sum um at talan verður um verri støðu fyri lærarastættina og pedagogstættina. Sum tað varð sagt á tíðindafundinum, so kunnu tað vera fyrimunir í møguleikanum fyri at fremja skjótari broytingar, enn tað var møguleiki fyri, tá ið talan var um lóg. Galdandi læraralóg er frá 1980. Tá ið ein so vital lóg er so mikið gomul, verður spennið stórt millum lógartekstin og veruleikan.

Nýggja kunngerðin er spennandi og nýskapandi: Møguleiki er at samlesa partar av útbúgvingunum, tað er møguleiki fyri at partar av útbúgvingunum kunnu vera eftirútbúgving samstundis, sum talan er um útbúgving, og so er tað sambært tíðarrákinum, at tað skal verða møguleiki fyri at lesa partar av útbúgvingunum á Læraraskúlanum og síðani at fara undir framhaldslestur á øðrum deildum á Setrinum ella á útlendskum lestrarstovnum.

Hugflogið tykist hava verið stórt í fyrireikandi arbeiðnum. Tað var hugaligt at hoyra, at hesa ferð hevur støðið verið tikið í Føroyum og føroyska veruleikanum, sum hann er í dag og verður mettur at fara at taka seg upp í framtíðini. Tað er nakað nýtt, at útgangsstøðið ikki verður tikið í donsku útbúgvingunum, og vit ynskja tillukku við hesum fína átakinum.

Næsta takið er at menna granskingina í føroysku skúla- og stovnsverðini. Vit ivast ikki í, at tað verður møguleiki at lyfta hesa avbjóðingina, tí áræðið og dynamikkurin tykjast vera stór, og tað eigur aftur rætta vegin at fara at ávirka samfelagið!

**Sosialurin**

## Almenna Jólaskipið fór til Newcastle

**HØGNI LÜTZEN**



Fyri stuttum sendi Smyril Line Nørrønu avstað til Newcastle á jólatúr, fullfermd av føroyingum, ið skuldu keypa jólagávurnar til ætt, vinir og kenningar.

Hugsaði fyrst, tá ið eg hoyrdi um hetta »væleydnaða« tiltak, at tað nokk kom væl við hjá Smyril Line, ið hevur siglt í tungum sjógvi fíggjarliga í nógv ár.

Men síðan rann tað fram fyri meg, at hesir á leið 1000 føroyingar mundu fingið keypt flest allar jólagávurnar í hesum stóra marglætis innkeypscentrinum í Newcastle. Hesi løgdu nú stórar upphæddir eftir sær í Onglandi, heldur enn í Føroyum.

Eg skilji tó væl allar teir føroyingar, ið velja at fara ein hugnaligan túr til Onglands at keypa jólagávur. Innkeypsprísurin er væl lægri enn í Føroyum, og enn størri avsláttur fær mann í hesum døgum, nú bretska pundið liggur so lágt.

Fyri ikki so langari tíð síðani kom politiski myndugleikin aftur Smyril Line til hjálpar. Hesaferð vóru tað uml. 30 milliónir, ið blivur sprændar inn í felagið, soleiðis at »lívsæðrin« Nørrøna kundi sigla áhaldandi út í heim. Nørrøna skuldi varðveitast, so útlendingar og føroyingar kundu ferðast til og frá Føroyum. Hvørt tílíkt skal stuðlast við almennum pengum, kann mann kjakast um, men at Smyril Line nú eisini sleppur at misbrúka henda kunstiga andadrátt at flyta føroyskan pening til útlandið, er burtur úr vón og viti. Her burdi politiski høvuðspartaeigarin vaknað úr dvala og talað at. Eitt er at spræna skattgjaldarans pening í privat feløg, men at loyva, at hesin peningur verður miðvíst nýttur at týna annað føroyskt vinnulív, er burtur úr vón og viti.

Eg eri stórliga bilsin yvir, at vinnulívið í Føroyum ikki enn hevur gjørt vart við seg viðvíkjandi alment fíggjaða innkeypstúrin til Newcastle, har teir knapt 1000 føroyingarnir mundu leggja fleiri milliónir eftir sær til jólagávur, so sum mótaklæðir, fløgur, skógvar, búnýti og annað.

Eksperimentið við almennum partapeningi í Smyril Line má fáa ein enda skjótast gjørligt. Møguliga hevur hetta gagnað felagnum, men tað hevur lagt nógvar fótonglar í vegin fyri annað vinnulív í Føroyum. Eg fari staðiliga at heita á Vinnumálaráðið um at syrgja fyri, at almenni partapeningurin í Smyril Line verður afturgoldin landinum skjótast gjørligt. Hetta »smá kommunistiska« eksperimentið eigur beinanvegin at verða lagt í niðastu skuffu og eigur framyvir bert at vera havt á lofti sum ein ræðusøga um miseyðnaðan planbúskab í Føroyum.

## Samgongan er dumpað og hevur sett landið í undantaksstøðu

Ein samlað andstøða á tingi tekur sterka frástøðu frá tí politiska óskili, sum valdar í landinum. Andstøðan mótmælir staðiliga, at samgongan hevur hildið alt samfelagið fyri gjøldur og nú blakar ábyrgdina frá sær í eini so álvarsligari støðu:

Ikki bert eru øll politisk mál og mið sett til viks, reformar sleptir – og fíggjar- og búskaparpolitikkurin umskapaður til ein høvil, sum í evstu løtu verður drigin eftir fíggjarlógini.

Samstundis eru allar demokratiskar mannagongdir settir til viks, og møguleikarnir hjá andstøðuni og borgarunum í samfelagnum annars at viðgera og ávirka avgerðirnar, burturtiknar.

Í eitt samfult ár hava landsstýrið og samgongan boðað frá sonevndum “pakkum”, ið hava verið nevndir “kreppupakki”, “vakstrarpakki”, “bygnaðarpakki” og at enda “ólavsøkupakki”. Dag um dag, hava løgmaður og landsstýrisfólk billað fólki inn, at:

- reformar skuldu gerast,
- øktar íløgur fremjast í niðurgangstíðum,
- samtyktir karmar haldast,
- og at alt skuldi verða “størstu broytingar í 20 ár ella í heimssøguni”.

Andstøðan hevur støðugt víst á, at talan var um tómar pakkar og royndir at villleiða almenningin. Og nú stendur øllum greitt, at onki hevur hildið av tí, sum landsstýrið og samgongan hava fráboðað: Løgtingssamtyktir verða ikki hildnar, broytingarlógir ikki framdar, íløgurnar minkaðar munandi – og í seinastu løtu verður bert hølvað burturav á øllum økjum uttan nakað politiskt mál og mið, sum fer at leggja byrðarnar á veikastu samfelagsbólkarnar. Hóast nú í evstu løtu verður skotið upp at flyta 124 mió. krónur frá íløgum til rakstur, er samtyktin um ólavsøkupakkan ikki hildin. Hetta er sostatt eisini brot á lógina um játtanarskipan.

Búskaparpolitikkurin og fíggjarlógin hevur onga viðgerð fingið á tingi, meðan samgongufólk hava nýtt alla politisku orkuna at spæla andstøðupolitikarar í fjølmiðlunum.

Nú leggur landsstýrið so eina heilt nýggja fíggjarlóg fram í evstu løtu, og ætlar at skrumbla bæði hesa nýggju fíggjarlóg og eina røð av øðrum uppskotum ígjøgnum uppá tveir til tríggjar dagar. Andstøðan og borgarar í samfelagnum annars hava ongan møguleika at viðgera uppskotini – og allar tær mannagongdir í stýrisskipan og tingskipan, sum skulu tryggja eina demokratiska og sakliga viðgerð av øllum málum og avgerðum, verða settar úr gildi.

Sostatt hevur samgongan spilt eitt heilt politiskt arbeiðsár burtur í mest avbjóðandi tíðum. Hon er dyggiliga dumpað og hevur sett landið í undantaksstøðu. Vit mæla staðiliga til, at samgongan leggur frá sær, og at flokkarnir verða settir frælsir at samráðast um at skipa eina bjargingarstjórn.

*Á løgtingi,*
*17. desember 2009*

**Vegna Tjóðveldi,**
**Høgni Hoydal**
**Vegna Miðflokkin,**
**Jenis av Rana**
**Vegna Sjálvstýrisflokkin,**
**Kári P. Højgaard**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.